*Anthony Layden frá bretsku sendistovuni í Keypmannahavn:*

# Væl nærri eini loysn



Tung fet í Tinganesi. Teir báðir samráðingarleiðararnir, Árni Olafsson og David Anderson á veg til enn eitt umfar í samráðingunum um undirgrundarmarkið. Mynd kalmar

## -Spill av tíð og nógvum pengum at fara til Haag-dómstólin

-Tað er rætt, at vit koma við einum útspæli, men vit vona sjálvandi, at tað verða tikin stig til framstig frá báðum síðum

Hetta sigur

Anthony Layden, sum luttekur í samráðingunum í Havn um ásetan av einum undirgrundarmarki millum Føroyar og Bretland

Anthony Layden, sum hevur verið við í hesum samráðingum í mong ár, sigur seg vera bjartskygdan, hvat eini loysn viðvíkur

-Vit hava gjørt framstig í



Føroysku samráðingarfólkini og bretar gera seg klár til nýggjar samráðingar. Mynd kalmar




Soleiðis ímyndaði skotska blaðið Press and Journal sær bretska kravið til undirgrundarmark, tá tað í 1992 kom fram, at bretar høvdu sett krav um mark heilt inn at klettinum. Út frá teimum upplýsingum, sum síðani eru komnir fram um gongdina í samráðingunum, so kann ein møgulig samráðingarloysn hava við sær eitt annað undirgrundarmark, sum liggur eina staðni ímillum upprunaliga bretska kravið og so verandi miðlinju, so nærri verandi miðlinjumarki

teimum seinastu umførunum og eru komnir væl nærri eini samráðingarloysn sigur hann við Tíðindablaðið Sosialinum.

**Neyvan til Haag**

Uppá fyrispurning um møguleiki er fyri, at ósemjan endar við dómstólin í Haag sigur bretski sendiharrin, at báðir partar eru sinnaðir at finna eina loysn við samráðingarborðið.

-Tað er spill av bæði tíð og pengum at fara til Haag við hesum málinum. Og vanliga kanst tú sjálvur við samráðingum koma fram til ta loysn, sum dómstólurin kemur til.

-*Men nú hava vit samráðst í so mong ár, so nøkur ár afturat við dómstólin gera hvørki til ella frá?*

-Eg haldi vit við hesum áralangu samráðingum eru komnir væl nærri eini loysn.

Hvat viðvíkur áhuganum frá oljuvinnuni at fáa eina loysn sum skjótast sigur Anthony Layden, at hvørgin av partunum er undir nøkrum trýsti frá oljuídnaðinum í hesum máli.

Tað er sera týdningarmikið at finna ta røttu loysnina fyri bæði londini.

Anthony Layden hevur verið fleiri ferðir í Føroyum. Seinast vitjaði hann her saman við umboðum fyri bretska oljuvinnu og aðra vinnu.

Í tí sambandinum helt hann fyri í eini røðu á eini samkomu í Havn, at hann trúði uppá, at ein loysn varð funnin í málinum, áðrenn hann fór at verða fluttur til London í august.

*Nú nærkast august og tvær tú framvegis uppá eina loysn til ta tíð?*

Nú er ætlan mín nakað broytt, so eg skal til London í endanum av september, og til ta tíð rokni eg við eini loysn.

Tilsamans átta fólk eru í bretsku samráðingarnevndini. Leiðari er David Andersen frá bretska uttanríkisráðnum.

Árni Ólafsson stendur á odda fyri føroysk/donsku nevndini. Fundurin var í Tinganesi í gjár og skuldi møguliga halda fram í dag.

jan




*Krøvini hjá teimum ymsu londunum til økini og so nýggju oljuleiðirnar við føroyska markið. Kelda DGU-Information*



*Undan samráðingunum í gjár. Mynd kalmar*




*Hetta kortið vísir okkum krøvini hjá Føroyum, Onglandi, Írlandi og Íslandi til stóra økið sunnan fyri. 1. er føroysk-danska kravið, 2. er írska, 3 er bretska og 4 er íslendska. Svarta og gráa økið er har bretska og írska kravið er tað sama sum føroysk-danska kravið*

**Situr tú við barninum í fanginum ?**



Visti tú av, at í brásteðgi úr 50 km/t er rørslumegin hjá barni, ið vigar 20 kg, <u>2 tons</u>



¡Bilbelti er livbelti !